# Skemt



MYND: POLFOTO



MYND: POLFOTO

## Nei, hetta er ikki eitt innkast

*Juliana Suarez er smidlig og fim. Hon er er fimleikari úr Kolumbia, og tí hevur hetta einki at gera við eitt innkast, sum vit kenna frá fótbólti. Hinvegin eru her kanska onkur góð hugskot at heinta til eitt langt innkast.*

## Smekka nú til

Tennisbólturin hevur beina kós ímóti fjesinum á Novak Djokovic undir dysti í Australia Open í Melbourne. Vit siga bara: »Smekka til!«




## Drongur til sølu

Kanska er tað fyri at fanga eygað. Kanska er tað eitt mistak. Ella kanska hevur lesarin broytt hugsan í evstu løtu. Yvirskriftin fyri einari lýsing í Lýsingatorginum nú um dagarnar var »Drongur til sølu«. Men tey, sum fingu ein hvøkk av yvirskriftini, kundu tíbetur ugga seg við, at tað hóast alt bert var ein dreingjasúkkla við trimum gearum, sum varð sett til sølu. Okkum vitandi sat eingin drongur á súkkluni, tá hon skuldi seljast.

## Í RANGASTRÚPAN

**Gott føroyskt**
- Tað hava vit simuplt hen ikki ráð tið. Vit hava eina stramma játtan í ár.
*Dimma*

**Neyð lærir nakna kvinnu at spinna**
Rósa Samuelsen: Eg má læra at selja meg
*Olivant*

**Vit orka heldur ikki at hoyra meira**
Loysn funnin um 10. flokk
*Dimma*

**Hvussu rullar ein bóltur av álvara?**
Nú rullar fótbólturin av álvara
*Dimma*

**Bara hasar lógirnar...**
Løgtingið viðgjørdi í morgun uppskot um nýggja stjórnarskipan, hóast tað er í stríð við bæði grundlógina, heimastýrislógina, stýrisskipanarlógina og tingskipanina.
*Sosialurin*

**Stór søga**
Yvirmaðurin á brúnni
*Dimma*

**Ja, líkist ongum at gera slíka lóg!**
Nú kemur nógv umstrídda kunngerðin, sum m.a. ger tað bannað at lata olju sleppa á sjógv, tá ið skip bunkra.
*Olivant*

**Uppfinnsama Dimma**
Íslendingar á gosi
*Dimma*

**Fyrr fóru teir við slupp til fiskiskap**
600 ungdómar fara við Norrønu í morgin
*Olivant*

**Slappa av, tey snakka um íbúðir**
Tær skulu verða bíligar at keypa
*Dimma*

## UMAFTURAFTURUM
## HØGNI DJURHUUS



# Ótíð

Hugaligt var hjá okkum morgunfólkum, nú tað var vorðið gonguljóst fyri klokkan seks. Men ikki tær, kæri lesari, at siga, so er øll gleði stokkut. Pálmasunnudagsnátt varð flokkan flutt. Summartíðin byrjaði, men hvar er summarið? Álmanakkin varð gjørdur, áðrenn globala upphitingin byrjaði. Klokkan varð flutt ein tíma fram, og tað styttist til deadline hjá Jóannesi og teimum tveir tímar í einum høggi.

Og nú er ikki ljóst fyrr enn klokkan sjey. Aftur út í myrkrið hvønn morgun.

Hatta við at flyta klokkuna fram og aftur og aftur fram er nakað tvætl. Tað ørkymlar fólk, tí hóast tey gera tað tvær ferðir um árið, hava tey hvørja ferð gloymt, hvønn vegin, klokkan skal flytast. Og tað ræður so sanniliga um ikki at klokka í tí. Var tað nú eina tíma fram ella ein tíma aftur ella øvugt ella bæði ella ein fram og tveir aftur?

Eini góð heimaráð (donsk ivaleyst) eru tey um havamøblarnar. Um várið verða havamøblarnir bornir út = klokkan skal flytast fram. Um heystið verða havamøblarnir bornir innaftur = klokkan skal flytast aftur.

Í Føroyum er ólukkan bara tann, at her standa havamøblarnir úti alt árið til teir fara á flog í fyrstu heystaródnini og enda í onkrum øðrum hava.

Nei, vit mugu hava eitt serføroyskt fyribrigdi at miða okkum eftir, tá klokkan skal flytast. Til dømis hetta: um várið leggur landsstýrið fram játtanarkarmin fyri næsta ár = klokkan skal flytast fram. Um heystið verður tað mesta tikið aftur = klokkan skal flytast aftur.

Men hví ólukkan skal klokkan flytast? Í nógvum londum, Ísland er eitt, er sama tíð alt árið. Eingin klokkuflyting. Orsøkin í Íslandi er virðingin fyri neytunum. Kýrnar toldu ikki hetta klokkuóskilið. Tær vilja verða mjólkaðar somu tíð alt árið. Lurtað varð eftir teimum.

Í Føroyum gera vit sjálvandi sum tey gera í Danmark. Tann dagur, tá føroyingar gera okkurt øðrvísi enn danskarar er líka fjarur sum tann dagur, ein samgonga verður samd. Vit kunnu heldur ikki vera bæði 30 ár og tveir tímar aftan fyri Danmark.

Sama ger so, um fólk koma ov seint til flogferðir, skurðviðgerðir, á stevnumøti, jarðarferðir, samgongufund og ein tíma og eitt korter ov seint til arbeiðis.

Jú, men, jú, men, tú ført tíman aftur síðst í oktober (í Danmark verður klokkan flutt ein tíma aftur síðstu sunnunátt í oktober, og tí sjálvandi eisini her hjá okkum). Jú, takk fyri tað, men tá ger hesin tímin ongan mun, tí tá er myrkt alt samdøgrið.

Almenna grundgevingin fyri hesum klokkutvætlinum er orkusparing, tí dagsljósið verður gagnnýtt betur. Hví so ikki flyta klokkuna fimm tímar, so orkusparingin verður fimmføld?

Tann fyrsti at nevna summartíð var Benjamin Franklin. Tað var í 1784 og hálvgum í spølni sigst. Tað var heldur ikki fyrr enn 30.apríl í 1916, at Týskland og Eysturríki fluttu klokkuna fyri at spara olju, tí kríggj var. Í Føroyum fingu vit summartíð við løgtingslóg í 1980. Tí Danmark fekk sær summartíð aftur í 1980.

Tað eitur summartíð, hin tíðin eitur ikki vetrartíð, summartíð byrjar og summartíð endar. Annars hevði ikki borið til at selt lortin.

Í Danmark er eitt skilafelag, sum eitur Landsforeningen mod sommertid. Tey høvdu aðalfund sunnunáttina 28.mars millum klokkan eitt og tvey – okkara tíð.

Summarið kom við kulda og kava. Tey flestu fluttu klokkuna í ótíð.

Nú er klokkan flutt, og hjá okkum morgunfólkum byrjar dagurin aftur í bølaniðu. Hví so ikki sova ein tíma longur og brúka seinnapartin? Nei, tá skulu vit spara orku, ikki so?